

**... vit vita lítið meiri enn tað, sum sagt hevur verið í fjølmiðlunum...**

JÓN RASMUSSEN

*- Tað hevur stóran samfelagsligan týdning, at makrelurin verður fiskaður í føroysum sjógvi, heldur Jón Rasmussen, skipari*

# Nú eiga vit at ganga plankan út

**MAKRELUR Jón Rasmussen, skipari á Norðborg, heldur, at Føroyar nú eiga at ganga plankan út í stríðnum um makrelin. – Eg haldi, at vit nú eiga at krevja okkara rættindi – og ikki venda aftur til gamla býtislykilin, sigur hann**



*- Nú vit eru farin út í hetta stríðið við ES og Noreg, haldi eg, at vit eiga at halda fast um okkara rættindi og áseta okkum eginkvotu fyri 2011, sigur Jón Rasmussen*

Vilmund Jacobsen

Jón Rasmussen, sum er annar skiparin á verksmiðjutrolaranum Norðborg, er ikki í iva um, at Føroyar nú eiga at halda fast í stríðnum við Noreg og ES um býtið av makrelkvotuni.

- Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum ásetti Føroyum eginkvotu fyri 2010, tá tað ikki eydnaðist okkum at fáa ein hampiligan prosentpart í býti, og nú ES og Noreg eru líka treisk við samráðingarnar aftur hesaferð, haldi eg, at vit eiga at halda fast um okkara krav, sum er umleið 15% av heildarkvotuni.

Jón Rasmussen sigur, at nú ES og Noreg hava ásett sær sín kvotupart, hevur hann í síni stillheit rokna seg fram til, at samlaði parturin, sum tey vildu latið Føroyum og Íslandi, er 10%, ið er tað, sum er eftir av kvotuni, tá ES og Noreg hava tikið sítt.

- ES og Noreg hava líka sum fyri ikki at taka øll 100%, latið eini 10% av heildarkvotuni verið eftir til Føroyar og Ísland, leggur hann aftrat.

Jón Rasmussen heldur ikki, at Føroyar skulu góðtaka ein part, sum kanska liggur um eini 8-9%, men eiga at halda fast um upprunaliga kravið um tey 15%.

- Nú vit eru farin út í hetta stríðið við ES og Noreg, haldi eg, at vit eiga at halda fast um okkara rættindi og áseta okkum eginkvotu fyri 2011, sigur skiparin.

## Stóran týdning

Jón Rasmussen heldur, at ein føroyskur kvotupartur av makreli á 15% kemur at hava stóran týdning fyri føroyska samfelagið í 2011.

- Vóru vit við í avtaluni, høvdu føroysk nótaskip ivaleyst fiskað meginpartin av kvotuni í norskum sjógvi, eins og skipini høvdu landað meginpartin av veiðini uttanlands. Nú makrelurin verður veiddur í føroyskum sjógvi, kemur meginparturin upp á land í Føroyum, bæði í Kollafirði og ein partur í Fuglafirði, samstundis sum ein fittur partur av fiskiskipafotanum fær lut í hesum.

Jón Rasmussen heldur annars, at samráðingarnar, sum verið hava millum strandalondini, hava verið rættiliga afturlatnar.

- Vit, sum eru í vinnuni, hava frætt lítið um, hvussu gongd og útlit hava verið. Vit vita lítið meiri enn tað, sum sagt hevur verið í fjølmiðlunum, leggur hann aftrat.

Skiparin ásannar, at makrelurin rættiliga hevur broytt sítt ferðingarmynstur nógv seinnu árini.

- Taka vit endan av áttatiárunum og fyrru árini í nítiárunum stóð rættiliga nógvur makrelur í norskum sjógvi heilt frá august til jólar. Í ár fingu skip nakað av makreli í norskum sjógvi í august og september – so var tað liðugt, sigur Jón Rasmussen, skipari á Norðborg.

*vilmund@sosialurin.fo*